# Fullveldismálið skal snikkast til fólksins vilja

*Løgmaður heldur tað hava týdning, at landsstýrið tekur nýggjastu veljarakanningina til eftirtektar. Ger landsstýrið ikki tað, sær hann vanda fyri, at ein nýggjur sáttmáli verður feldur við fólkaatkvøðuna*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður heldur tað avgjørt vera neyðugt at samráðast eftir verandi sáttmálauppskoti fyri at fáa avklárað, hvat føroyingar og danir eru ósamdir um í ríkisrættarliga spurninginum.

Men samstundis heldur Anfinn Kallsberg tað hava alstóran týdning, at landsstýrið tekur nýggjastu veljarakanningina til eftirtektar, so endin á øllum ikki verður, at samráðingarúrslitið verður felt á eini fólkaatkvøðu í Føroyum.

**Breiði meirilutin neyðugur**

Veljarakanningin, sum Fynd júst hevur gjørt fyri Útvarp Føroya og Dimmalætting, vísir, at annar hvør føroyskur veljari velur víðkað sjálvstýri fram um fullveldi. Og fullveldi er júst tað, landsstýrið leggur upp til í samráðingunum við danir um ríkisrættarligu støðu Føroya. Hinvegin sigur andstøðan seg hava eitt alternativ til fullveldisætlanina - eitt uppskot, ið byggir á víðkað sjálvstýri.

Tí er spurningurin til løgmans, um landsstýrið ikki eigur at endurskoða fullveldisætlanina og einaferð enn royna at finna fram til eina loysn, ið hevur breiðan parlamentariskan meiriluta aftan fyri seg í Føroym, áðrenn farið verður víðari í ríkisrættarligu samráðingunm.

Løgmaður heldur tað avgjørt vera neyðugt at hava breiðan parlamentariskan meiriluta aftan fyri seg. Men hendan roknar hann við at finna fram til, so hvørt samráðingarnar líða.

– Eg rokni avgjørt við, at vit fáa nøkur ting avklárað undir samráðingunum, ið kunnu gera, at landsstýrið og samgongan semjast so við og við, sigur Anfinn Kallsberg. Hann vísir eisini í sama sambandi á, at landsstýrið í veruleikanum hevur sum endamál at koma til eina loysn undir samráðingunum, sum í veruleikanum er broytt ríkisrættarlig viðurskifti, ið andstøðan eisini sigur seg taka undir við. Tað er bara mannagongdina, vit eru ósamd um, leggur hann afturat.

**Stór uppgáva**

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, hevur fleiri ferðir gjørt heilt greitt, at landsstýrið miðvíst er farið undir eina ætlan, ið merkir, at Føroyar fáa fullveldi. Veljarakannigin hjá Útvarpi Føroya og Dimmalætting sýnir okkum, at ein triðjingur av øllum føroyingum heldur ynskja víðkað sjálvstýri.

Løgmaður heldur tað, sum áður nevnt, vera neyðugt, at landsstýrið tekur veljarakanningina til eftirtektar. Tí er spurningurin til løgmans, um tað ikki er ein stór uppgáva hjá honum at halda Tjóðveldisflokkinum aftur, so tað ikki verður farið ov ógvusliga fram í ríkisrættarliga spurninginum.

Til hetta svarar løgmaður, at hann hevur eina stóra uppgávu í at finna eina loysn, sum Føroya fólk kann taka undir við. Anfinn Kallsberg ásannar, at hetta eisini merkir, at hann má halda saman upp á ymisku meiningarnar í landsstýrissamgonguni.

**Harðar samráðingar**

Anfinn Kallsberg væntar avgjørt, at úrslitið av veljarakanningini ger samráðingarstøðuna á næsta samráðingarfundinum, sum verður 2. mei, torføra. Men hann vísir kortini á, at landsstýrið er væl fyrireikað upp á nógvar ymiskar møguleikar, ið kunnu setast saman.

Hóast løgmaður væntar torførar samráðingar, væntar hann kortini, at nøkur ting verða avklárað á fundinum 2. mei. Hetta sigur hann seg hava fingið greiðar ábendingar um úr Danmark.



*Anfinn Kallsberg heldur tað hava alstóran týdning, at landsstýrið tekur nýggjastu veljarakanningina til eftirtektar, so endin av øllum ikki verður, at samráðingarúrslitið verður felt á eini fólkaatkvøðu*

# Endaliga loysnin liggur nær Javnaðarflokkinum



*Jóannes Eidesgaard væntar, at endaliga loysnin á ríkisrættarliga spurninginum fer at liggja ógvuliga nær sjálvstýrisuppskoti Javnaðarfloksins*

*Jóannes Eidesgaard sigur seg vóna, at lansstýrið fer at endurskoða samráðingarútspæl sítt, so ein loysn kann finnast á ríkisrættarliga spurninginum, ið fólki tekur undir við*

JOHN JOHANNESSEN

– Eg vóni, at landsstýrið fer at endurskoða samráðingarútspæl sítt til ríkisrættarligu samráðingarnar. Útspælið leggur upp til fullveldi, meðan veljarakanningin hjá Útvapinum og Dimmalætting sýnir okkum, at føroyingar heldur ynskja víðkað sjálvstýri. Tí má landsstýrið taka veljaran til eftirtektar og broyta samráðingargrundarlagið.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, eftir úrslitið av veljarakanningini hjá Útvarpi Føroya og Dimmalætting.

Jóannes Eidesgaard heldur, at um landsstýrið letur vera við at taka kanningina til eftirtektar, men í staðin heldur fram at samráðast eftir tí leisti, sum lagt varð upp til á seinasta samráðingarfundinum, fer endaliga sáttmálauppskotið at fella við eina føroyska fólkaatkvøðu. Hetta, heldur hann, fer at elva til miklar ruðuleika í samfelagnum og somuleiðis til kílar í samstarvinum við Danmark.

Jóannes Eidesgaard heldur tískil, at nakað, ið líkist sjálvstýrisuppkskoti Javnaðarfloksins, verður brúkt sum grundarlag undir samráðingunum.

**Nýggj samgonga**

Tað kann ikki væntast, at Tjóðveldisflokkurin fer at verða sinnaður at broyta samráðingaruppleggið, soleiðis, at landsstýrið í staðin fyri at samráðast um fullveldi, heldur fer at samráðast um víðkað sjálvstýri. Tí síggja bæði formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, og formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen, eina nýggja samgongu sum bestu loysnina á ríkisrættarliga spurninginum.

Hesir báðir andstøðuleiðararnir eru samdir um, at bæði Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin høvdu tikið undir við, at samráðingarleisturin varð broyttur soleiðis, at víðkað sjálvstýri var endamálið.

Jóannes Eidesgaard sigur tað vera ógvuliga trupult at vísa á nakað annað enn sjálvstýrisuppskot Javnaðarfloksins, at nýta sum grundarlag fyri ríkisrættarligu samráðingunum hjá einari aðrari samgongu. Men kortini vísir hann á, at tað eigur at bera til at samráða seg til eitt uppskot millum hesar flokkar.

**Serfrøðingar viðmæla uppskotinum**

Formaður Javnaðarfloksins sigur seg hava ráðført seg við nógvar viðurkendar serfrøðingar, bæði áðrenn og eftir, at sjálvstýrisuppskotið varð gjørt. Hesir serfrøðingar viðmæla, sambært Jóannesi Eidesgaard allir sjálvstýrisuppkostinum.

Ein av hesum mongu serfrøðingunum, Jóannes Eidesgaard, hevur havt samband við, er doktarin í løgfrøði, Frederik Harhoff. Hesin er, sambært Jóannesi Eidesgaard, sannførdur um, at sjálvstýrisuppskotið er besta uppskotið. Hetta gjørdi Frederik Harhoff eisini greitt í viðtalu við Føroysku Tíðindastovuna í Keypmannahavn beint eftir spurnarorðaskiftið á fólkatingi um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Doktarin í løgfrøði fegnaðist um, at danski forsætisráðharrin hevði nevnt økt føroyskt sjálvstýri, ið ikki kann takast aftur, sum ein møguleika. Hann vísti á, at stjórnin nú á fyrsta sinni hevði viðurkent, at grundlógin heimilar, at Danmark letur frá sær vald í tíð og ævir. Harhoff vísti Føroysku Tíðindastovuni á, at tað áður hevur verið ført fram, at heimastýrislógin er ein delegatión, sum í prinsippinum kann takast aftur, um tá hóvar fólkatinginum. Men nú hevði stjórnin alment viðurkent, at grundlógin heimilar delegatiónum, sum ikki kunnu takast aftur.



# Málið um bróstkanningar dregur út



*Nú er nakað væl fráliðið, og skuldi tí borið til at frætt nærri, um ætlanin er slept ella, hvat ið røkist fyri hesum kanningum, sigur Katrin Dahl Jakobsen í viðmerkingum til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Í januar 99 spurdi Katrin Dahl Jakobsen landsstýrismannin um bróstkanningar. Í svarinum frá Helenu Dam á Neystabø varð tá greitt frá, at eftirlitsmyndugleikin hjá føroyska heilsuverkinum, danska Sundhedsstyrelsen, hevur mælt til, at mammografi screening verður gjørd av kvinnum í aldursbólkinum 50-69 ár.

– Landsstýrismaðurin segði seg tá kanna, um og undir hvørjum formi hetta átti at verið sett í verk í Føroyum. Viðvíkjandi fakligum førleika og útgerð helt landsstýrismaðurin, at bæði vóru til staðar á Landssjúkrahúsinum.

– Landsstýrismaðurin segði seg samdan við spyrjaran, at slíkar kanningar eiga at setast í verk í Føroyum. Tó vísir hon á, sum rímiligt er, at málið má fyrireikast, og at arbeitt varð við hesum innan heilsuverkið, sigur Katrin Dahl Jakobsen í viðmerkingunum.

**Útgerð**

Og tí spyr Katrin Dahl Jakobsen, hvussu líður við fyrireikingunum til at fara undir regluligu bróstkanningarnar (mammografi screening), sum ætlanin var at fáa at virka? Hvørji stig eru tikin í hesum máli? Er fakligur førleiki og útgerð til endamálið framvegis til staðar á Landssjúkrahúsinum? Hvussu nógv fer ætlanin at kosta at seta í verk, og hvat verður árliga útreiðslan? Og at enda, nær vit kunnu vænta, at skipanin fer at virka?

*Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna*

# Svar um tey lesandi í øðrum londum

*Hvussu langt er landsstýrið komið við at gera avtalur við onnur lond um samstarv á útbúgvingarøkinum? Hetta vil Heðin Mortensen eisini hava at vita frá Høgna Hoydal, sjálvstýrismálaráðharra, í fyrispurningi um lesandi í Danmark*

ÓLAVUR Í BEITI

Nú vil Heðin Mortensen, tingmaður Sambandsfloksins, hava greitt svar frá Høgna Hoydal, sjálvstýrismálaráðharra, og hevur Heðin Mortensen sett landsstýrismanninum tríggjar spurningar. Fyrst verður spurt, Hvørjar útbúgvingarmøguleikar føroyingar fáa í Danmark, um so er, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, og ein avleiðing av hesum er, at føroyingar missa sín ríkisborgarætt í Danmark? Og høvdu føroyingar, sum útbúgva seg í Danmark fingið danskan lestrarstuðul, um Føroyar blivu skipaðar sum fullveldisríki, og føroyingar mistu sín ríkisborgararætt í Danmark? Og hvussu langt er landsstýrið komið við at gera avtalur við onnur lond um samstarv á útbúgvingarøkinum?

**Ikki felags ríkisborgararætt**

Í viðmerkingunum sipar Heðin Mortensen til samrøðu við Sosialin hin 25. august 1998, har Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sigur: „Politikkurin hjá okkum miðar eftir einum felags ríkisborgararætti fyri føroyingar og danir. Tí verða útbúgvingarmøguleikarnir, sum vit hava í dag, teir somu – teir verða ikki skerdir“ (sitat endað).

– Nú hava vit fingið at vita frá donskum politikarum, at føroyingar fáa ikki henda felags ríkisborgararættin, um Føroyar gerast fullveldi. Tí er spurningurin nú, hvat hendir við lesandi føroyingum, sigur Heðin Mortensen, um Føroyar gerast fullveldi, og føroyingar missa danska ríkisborgararættin? Missa føroysk lesandi danska lestrarstuðulin, og hvat hava vit at geva teimum ístaðin? Verða tey



*Heðin Mortensen, løgtingsmaður Sambandsfloksins*

(ella føroyskir myndugleikar) noydd at gjalda fyri útbúgvingina og missa tey tann sonevnda føroyafrádráttin? Og hvussu verður við íbúðarmøguleikum?

**Onnur lond**

Eisini verður nevnt í viðmerkingunum, at sjálvstýrismálaráðharrin sigur í Sosialinum, at tað er týdningarmikið, at vit eisini fáa avtalur við onnur lond um útbúgving.

– Spurdur um nøkur ítøkilig avtala er gjørd við norðmenn og íslendingar, sigur Høgni Hoydal við Sosialin, at enn er ikki nøkur avtala gjørd, men at hetta arbeiðið er í gongd. Tí kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu langt landsstýrið er komið við hesum arbeiði, nú meira enn hálvtannað ár er farið síðani samrøðan varð gjørd, og tíðin nærkast, tá landsstýrið ætlar at Føroyar skulu gerast fullveldisríki, sigur Heðin Mortensen í viðmerkingunum.

# Føroyingar eiga at verða kunnaðir umaftur

*– so at fólkið fær at vita, hvørjar tær veruligu avleiðingarnar verða av eini møguligari loysing, sigur Edmund Joensen í viðmerking til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

– Hevur landsstýrið ætlanir um av nýggjum at kunna føroyingar um avleiðingarnar av einum møguligum fullveldi, nú fortreytirnar eru munandi broyttar? Um landsstýrið ikki sjálvt ætlar at kunna føroyingar av nýggjum um avleiðingarnar av einum møguligum fullveldi, eru so nakrar ætlanir um at lata andstøðuna fáa burtur av játtanini til sjálvstýrismál, so at andstøðan kann útvega føroyingum upplýsingar, sum samsvara við nýggju støðuna? spyr Edmund Joensen í fyrispurningi Anfinn Kallsberg, løgmann.

**Einsíðug kunning**

Í viðmerkingunum, sigur Edmund Joensen, at í sambandi við tað sonevnda fullveldismálið hava føroyingar fingið nógva einsíðuga kunning, bæði við Hvítubók, Caragata álitinum og ikki minst á herferðini kring um í landinum, sum landsstýrið skipaði fyri í sambandi við, at Hvítabók kom út. Eisini er internetið brúkt til hesa einsháttaðu kunning, og fjølmiðlarnir hava somuleiðis verið nógv nýttir.

– Øll henda kunning byggir á ta fortreyt, at búskaparliga skiftistíðin verður 15 - 20 ár, og at føroyingar varðveita danska ríkisborgararættin. Við øðrum orðum skal alt halda fram sum higartil.

– Samlaða niðurstøðan hjá landsstýrinum av hesi kunning hevur tí verið, at avleiðingarnar av eini møguligari loysing verða ikki so ógvisligar (hóast Hvítabók og aðrar frágreiðingar vísa á bæði fólkafráflyting, stór afturstig fyri búskapin og munandi lækking av livistøðinum). So at siga øll rættindi skulu sambært landsstýrinum halda fram sum higartil, umframt at vit fáa fleiri nýggj rættindi.

**12 mió. krónur**

– Umleið 12 mió. kr. eru avsettar til sjálvstýrismál, har ímillum kunningina, sum øll byggir á áðurnevndu fortreytir. Men longu á fyrsta samráðingarfundi við donsku stjórnina fingu føroyingar greitt at vita, at fortreytirnar verða



als ikki tær, sum landsstýrið hevur roknað við og greitt Føroya fólki frá í allari sínari kunning.

– Skiftistíðin verður 3 – 4 ár, og føroyingar missa danska ríkisborgararættin og øll tey rættindi, ið hesin gevur. Spurnarorðaskiftið í Fólkatinginum vísti eisini, at danska stjórnin hevur breiða undirtøku í Fólkatinginum fyri hesum sjónarmiðum.

– Tí eiga føroyingar at verða kunnaðir umaftur, so at fólkið fær at vita, hvørjar tær veruligu avleiðingarnar verða av eini møguligari loysing. Um landsstýrið ikki ætlar at gera hesa kunning, eigur andstøðan at fáa part av játtanini til hetta endamál, tí tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at Føroya fólk ikki fær sannleikan at vita, sigur Edmund Joensen í viðmerkingunum.


H. K. A. REINGERING søkir 20 reingeringsfólk.

Løn eftir avtalu.



H. K. A. REINGERING FEVNIR UM:
Veggja- og loftsvask
Gólvvask
Gólvpolering
Trýstspuling
Teppirens
Reingerð av ventilatión
Vanliga reingering

ØKI:
Slaktaríir
Kantinur/Køkar
W.C.
Lagur
Skrivstovur
Handilsrúm
Ídnaður/ Maskinur v.m.
Ítróttarhallir v.m.

Sosialurin - 311820

ISO 9001 CERTIFIKAT
H.K.A. REINGERING
v/Hanneba K. Andreasen • Heiðagøta 10 • 160 Argir • Tel 32 15 80